# Jólakalendarin 2005

## Jólini í Hvannadali




Norðarlaga í Føroyum liggur bygdin Hvannadalur, sum er ein vøkur føroysk bygd. Bygdin líkist øðrum bygdum í Føroyum. Har er ein kirkja, eitt bygdarhús, eitt lítið torg og mitt gjøgnum bygdina rennur ein stór breið á. Fólkini, sum búgva í Hvannadali, eru júst eins sum onnur fólk í Føroyum. Har búgva sjómenn, flakakvinnur, skrivstovufólk, timburmenn og ein rúgva av fittum og fyrikomandi børnum. Nakað sum er heilt serligt við Hvannadali er, at har eisini búgva tvey trøll – Trølla Pætur og Trølla Omman. Tey búgva í einari lítlari lon, sum liggur ovarlaga í bygdini. Fyrr var hetta hús eitt seyðahús, men fyri stuttum keypti Trølla Omman hetta húsið frá bóndanum, og har býr hon nú saman við Trølla Pæturi.

Í dag byrjar søgan um jólini í Hvannadali, og nú mugu tit fylgja væl við. Tí frá í dag av og heilt fram til jóla fara vit at fylgja við, hvussu jólini í Hvannadali fara at verða. Setið tykkum væl til rættis, tí nú byrjar søgan:

Oman fyri bygdina stendur eitt høgt og stórt fjall sum eitur Stórafjalli. Tað sum er serligt við hesum fjalli er, at har býr jólamaðurin. Og júst í dag er jólamaðurin á veg oman í bygdina. Uttan fyri er kavarok og nógvir vindur, men tað heldur houm tó ikki aftur. Eins og undanfarin ár, so má hann syrgja fyri, at børnini í Hvannadali fáa pakkar til jóla. Jólamaður er ein tjúkkur gamal maður, so hvørjaferð hann setur fótin fyri seg, so smokkar hann langt niður í kavan, og av tí at hann ikki orkar so væl at ganga, sum hann gjørdi tá hann var ungur, so má hann steðga á av og á fyri at hvíla seg. Hann roynir at hyggja framman fyri seg, men av tí at tað er kavarok og vindur, sær hann ikki fram um nøsina.

Í einum lítlum neyðarsligum skúri nakað oman fyri bygdina sita Anthonio og Stampi. Av tí at teir eru nakrir tjóvar, sum stjala bæði leikur og pengar frá børnum, vilja teir ikki fara oman í bygdina, tí um teir gera tað, so kemur løgreglan eftir teimum. Inni hjá teimum er ísakalt, og sjálvt um teir hava tendrað nøkur jólaljós, sum teir hava stolið, so hjálpir tað einki móti kuldanum.

Niðri í bygdini verður gjørt klárt til jóla. Jólaperur og annað pynt verður hongt upp, og fólk ganga í gøtunum og hugna sær. Úr einasta handlinum í bygdini koma Trølla Omman og Trølla Pætur. Lagið er sum verða man gott á teimum, tí eisini tey gleða seg til jóla. Tey heilsa upp á øll børnini, sum tey møta, og fólk eru blíð við tey.

Mitt í bygdini eru menn í ferð við at seta ein stóran pall upp, tí seinni í dag kemur jólamaðurin at tendra jólatræið. Jógvan yvirpolitimeistarin og Erling politistur skipa fyri, men tað gongur einki serliga væl, og tí er Jógvan yvirpolitimeistari í sera ringum hýri.

Soleiðis byrjar søgan hjá okkum. Jólamaðurin er á veg oman í bygdina, Stampi og Anthonio sita í einum skúri oman fyri bygdina, trøllini ganga í bygdini og hugna sær, og politistarnir eru í ferð við at seta ein pall upp, tí seinni kemur jólamaðurin at tendra jólatræið.

Nú hava tit fingið ein lítla mynd av, hvar bygdin Hvannadalur liggur, og hvør býr í hesari bygd. Komandi dagarnir fara vit at fylgja væl við, hvussu leikur fer – og hvussu jólini fara at verða í Hvannadali. Gleði tykkum.

*Puntur 1 til jólakalendaran*




